# Førka teg spakuliga yvirum

## Um ummæli og ummælarar í Føroyum

KINNA POULSEN
Listfrøðingur



Føroyar hava fingið eina ummælarastatt. Tíðin er farin, tá tað einasta, ið hoyrdist frá hendinga ummælarum vóru herðaklappini, sum við hondkraft vórðu trýst niður á skrivimaskinutastaturið, við svertu prentað á pappír og við skili fyri rættstaving sett í blýggi. Tilsamans eru vit ikki so fáment longur, vit dømandi serfrøðingar, sum javnan ummæla bøkur, framførslur, fløgur, filmar osfr. í Mentanartíðindum í SVF, í Kulturu í ÚF, í bløðum og í tíðarritum. Í mun til áður eru miðlarnir fleiri og fjølbroyttari, eins og leiðin frá tanka til teldutastaturið, mikrofonina, sjónvarpsmyndatólið, internetið osfr. er skjótari enn nakrantíð. Mentanin er í broyting. Okkara áður so smædna undirbrotligheit tykist hamskift við ein meira sjálvsikran verðinsborgarahugburð, har lokalt og globalt verða javnsett ivaleyst og uttan trupulleikar.

### Við Carl Johan sum fyrimynd

At samskiftismøguleikarnir batna er sjálvandi gott og ikki minst, tá hugsað verður um heimlandið sum oyggjaland mitt í Atlantshavi. Neyvan er tað minni gott, at vit fáa fleiri, ið tora at siga teirra ærligu meining um tað, tey ummæla. Og eg haldi, at vit ummælarar í løtuni veruliga royna sum frægast at vera atfinningarsom. Vit ynskja kanska frástøðu millum okkum og ovurhonds rósaríið, sum gamla, góðsliga ummælaríið var merkt av. Tað skal ikki eitast um okkum, at vit ikki eru kritisk, ella at vit ikki tora. Navnframi ummælarin á Fregnum er við sínum skilagóðu, undirhaldandi og onkuntíð heldur miskunnarleysu ummælum vorðin eitt slag av fyrimynd og vegara innan modernaða føroyska ummæli, eisini hjá teimum, sum hildu hann vera ov harðan. Sjálvandi koma ummæli enn ofta fyri, sum í besta føri minna um eitt slag av findarblíðum tíðindaskrivum, men sum heild hava føroysk ummæli seinastu árini víst lyndi til at gerast strangari og meira atfinnandi. Víst er tað gott og neyðugt at tora, eins og tað er ein lætti, at hampuliga tøgnin og ævigi fagnaðurin er um at vera avloystur av skilagóðum, opnum kritikki. Men áðrenn vit geva fríar ræsur, skulu vit kanska hugsa okkum um, so at vit hvørki gloyma virðingina fyri listini, ella virðingina fyri listaummælarafakinum. Hóast yrkisgerðin av føroysku listini er komin langt, hongur listaumhvørvið enn afturúr, bæði tá hugsað verður um ummæli og listafatan sum heild. Listaáhugin tykist vaksandi og hetta mann vera ein orsøk til, at listin verður raðfest í miðlunum. Men hóast vit í dag hava høvið at uppliva fleiri mentanarsendingar, greinar o.a. er listin eyðsýniliga enn ikki raðfest so ovaliga, at miðlarnir seta í starv mentanarjournalistar. Hetta er helst ein orsøk til hvussu ókritiskar samrøður við lista- og mentanarfólk tykjast í mun til tá tosað verður vinnufólk, politikarar o.o.

### Allahandaummælarar

Ein annar trupulleiki fyri støði á føroyskum ummælum er lyndið til, at ein ummælari ummælir fleiri listasløg. Tíanverri eru vit ummælarar ikki markleys í okkara vitan, treyðugt, so og vit munnu vera fá, ið hava nóg gott innlit til tess at ummæla fleiri øki innan listina. Tá vit allíkavæl kasta okkum yvir at ummæla yrkingar, gospelkonsertir, skaldsøgur, málningar, filmar, country- og kórtónleik hvørt um annað, kann hugsast, at vitanin og innlitið í onkrum av hesum økjum, er avmarkað. Í slíkum førum gerast ummælini vánalig og grunn.

### Upplegg til kjak

Ein skjót gjøgnumblaðing í blaðbunkanum, ið liggur í køkinum klárur at koyra í skrell, avdúkar ein hóp av ummælum, ið eru sera ymishættað innihaldi og dygd viðvíkjandi. Summi teirra stava frá blaðfólki, meðan onnur eru orðað av akademikarum og øðrum, ið eins og undirritaða hava ummælaríið sum eitt slag av eykastarvi. Anna V. Ellingsgaard er blaðfólk her í blaðnum og hevur m.a. ein fastan teig við bókaumrøðu. Hon ger eisini samrøður og dugir at spyrja kritiskt, serliga tá tað snýr seg um bókmentir. Sum heild munnu tað vera bókmentirnar, ið eiga og sum higartil hava átt tey flestu ummælini í føroysku miðlunum. Innan sjónleikin eru ummælini heldur færri, men eitt nú plagar annar Kulturaverturin, Høgni Djurhuus at liggja framvið, tá Tjóðpallurin setir leikir upp. Innan filmsøkið í Føroyum eru vit brádliga farin frá eini nærum nullstøðu til Klippfisk, Agurk, Da Vinci Code-kjak, filmsskúla og breiðum áhuga fyri filmsummælum, sum eru spakuliga vaksandi m.a. við greinum eftir Gudmund Nielsen og Kim Simonsen. Tónleikaummælini gerast (í sambandi við sonevndan rútmiskan tónleik) eisini fleiri og fleiri m.a. við føstum teigi í Dimmu hjá m.a. Una L.Hansen. Klassiskur tónleikur átti at havt fleiri ummælarar her á landi, men hetta er kanska eitt serliga sjálvatfinningarsamt fólkaslag. Í øllum førum eru ikki nógv, ið ummæla innan hetta øki. Byggi- og brúkslistin er stak illa fyri, tá tað snýr seg um ummæli. Myndlistin hevur heldur ikki nógvar ummælarar og ivaleyst eru summi, sum halda undirritaðu vera heldur einsamalla á økinum við hvørt, men við tað, at áhugin fyri myndlist er vaksandi, munnu fleiri ummælarar fara at traðka til eisini innan myndlistina. Ummæli er ein ogvuliga rúmlig sjangra. Umframt eina nøktandi lýsing av avvarðandi listaverki ella framførslu, inniheldur góða ummælið eina ærliga og neyva meting. Restin er upp til tann einstaka ummælaran, hvørt hann vil samanbera við onnur verk hjá viðkomandi ella øðrum, ella hann greiðir frá rákinum, sum listafólkið er ávirkað av ella okkurt heilt annað. Eitt gott ummæli er eisini eitt upplegg til kjak og tí er tað eisini eitt greitt mentanarligt heilsutekin, tá ummælið fær fólk at kjakast.

### Við fagurfrøðiligum tilviti

Ein av føroysku ummælarunum, sum seinnu árini í serligan mun hevur elvt til kjak er omanfyrinevndi Kim Simonsen, ið eisini er nógv tann ídnasti ummælarin og viðmerkjarin í Føroyum. Umframt meturvís av ummælum, ritroyndum, greinum, útvarps- og sjónvarpsviðtalum, greinasavn og tvey yrkingarsøvn hevur hann nú givið út tvær útgávur aftrat av mentanartíðarritinum "Outsider Magazin". Øll hava vit okkara ávísu hugsan um hvat er gott og hvat er minni gott og soleiðis er sjálvandi eisini við ummælarum. Danski filmsummælarin Ole Michealsen var t.d. kendur fyri at vera burtur í nærum øllum fronskum filmum, meðan serliga amerikanskir actionfilmar buðu honum ímóti. Tónleikaummælararnir á Dimmu tykjast dáma best progressivan "G!"-tónleik, eins og undirritaða hevur sýnt serligan áhuga fyri yngra ættarliðnum av føroyskum myndlistafólkum. Tað er fáum eygleiðarum í okkara flákrandi tíðarskeiði beskorið at uppliva eitt veruligt nýbrot av tí ítøkiliga slagnum. Tí hevur tað kanska verið serliga áhugavert at fylgja myndevnisbroytingini í tí yngru myndlistini og sum Brandes á sinni pallseta eitt fagurfrøðiligt nýbrot og tað tykist vera okkurt líknandi, sum Kim Simonsen er farin í holtur vil. Av tí, at Kim Simonsen skrivar so nógv sum hann ger, ber til at eygleiða og fylgja við í hansara fagurfrøðiligu hugsanum t.d. í sambandi við poesi. Bara tað, at hava fagurfrøðiligt grundaðar metingar, kann jú tykjast sum eitt framstig í mun til føroysk listaummæli sum heild, men tað er vandamikið um hesar gerast ov einoygdar, serliga um ummælarin beinleiðis fer í hernað móti einum ávísum bókmentaráki og einum ávísum yrkjara. Í greinarøðum hevur Kim Simonsen umrøtt føroyskar yrkingar, har hann ferð eftir ferð kemur til somu niðurstøðu, at yrkjarar sum t.d. Jóanes Nielsen og trubadururin Kári P hava meir uppá seg poetiskt enn yrkjarar sum Carl Johan Jensen, Oddfríður Rasmussen og Tóroddur Poulsen. Í tekstunum hjá tí fyrra bólkinum, sær Kim sonevndan ektaðan pathos, meðan tann seinni bólkurin av yrkjarum verður kveistraður burtur sum ironiskur og harvið einkisigandi. Tað er, sum nevnt, ikki bert í einari grein hjá Kim, at henda uppbýtingin kemur fyri, men nógvastaðni og serliga




*Rastur 05*



*Skaldskaparinnar guli fuglur verður burturfluttur til himmals 05*




*Tíð 06*